vóru eisini til staðar. Tá var eisini sungin sangur við eini heilt serligari søgu. Hann var nevnuiliga funnin uppi á tí deyða Jógvan Thomassen. Honum og hansara sangi greiða vit frá í komandi parti.

Í Reykjavík máttu teir eisini keypa klæði. Tað var Sámal Ellingsgaard úr Miðvági, sum skipaði fyri hesum. Teir keyptu í part fyri upp til kr. 100, og rokningin varð send donsku sendistovuni í Reykjavík.

Tryggingin kann so neyvan hava tikið við, tí tá menninir koma heima aftur verða teir kravdir eftir hesum pengum. Tað var ymiskt, sum tað var goldið, tí heilt fram til 1934 fara hesar innkrevjingar fram. Hesa tíðina høvdu fiskimenn ikki pening til slíkar eykarokningar. Onkur fekk at enda sína skuld eftirgivna.



*Partur av húskinum Millum Garðarnar.* ***Aftara rekkjan frá vinstru:*** *Ziska sjálvur, Marin Malena, mamma hansara, systrarnar Sigga og Oluffa.* ***Fremra rað:*** *Beiggin Hjalmar, pápin Jákup og beiggin Sámal*



*Gøtu Jákup hevði mist annað beinið. Men fyri tað var hann líka raskur at velta og at rógva út*

## Viðurkenning frá Stauning

Tann 17. november 1930 skrivar Thorvald Stauning, sum tá umframt at vera forsætismálaraðharri eisini var sjóvinnu- og fiskimálaráðharri bræv til Hjalmar Ringberg, amtmann, har millum annað verður sagt eftir fyrst at greitt verður frá bjargingarbragdinum hjá Ziska:

"I denne anledning skal man, ved at meddele, at Ministeriet for Søfart og Fiskeri har besluttet at tildele Fisker Peter Ziska Jacobsen en Erindringsgave som Paaskønnelse for den af ham ved den omhandlede Lejlighed udviste modige og behjertede Optræden, anmode Hr. Amtmanden om at ville være ulejliget med at tilkalde den paagældende Fisker og overfor ham give udtryk for Regeringens Paaskønnelse af og Tak for den af ham ved den omhandlede Lejlighed udførte Redningsdaad samt at overrække ham det Dem her i Ministeriet under 13. d.M. overleverede Guldur med Inskription som et Minde om Begivenheden.

Det tilføjes, at man vilde sætte Pris paa at modtage Meddelelse om Errindrinsgavens Overrækkelse.

Th. Stauning
/Emil Krogh

# Hvør var Ziska?

**Tað er ein partur av hesi søgu hvør ið Ziska var. Greitt verður bæði frá ættini og honum sjálvum**

### Ættin

Pápi Ziska var sonur tann í Norðoyggjum so væl kenda Gøtu Jákup. Um hann skrivar J. Símun Hansen um húsini "Millum Garðanna."

Hjá Høgna Jákupi, (teir vóru trýmenningar) var leingi ein húskallur, sum æt Jákup Jacobsen. Hann giftist í 1882 við Marin Malenu Fr. Ziska, dóttir Kristoffer Ziska í Gerðum. Hann fekk eina trøð burtur av Oyrarhaga millum Oyrar og Gerðargarð. Hann bygdi um somu tíð hús, hjall og neyst. Eini tíggju ár seinni fóru húsini av vindi. Tá bygdi hann eitt sindur norðari eina langa lon, sum í 1916 varð niðurtikin.

Tá fluttu tey til Klaksvíkar og bygdu á Fløttinum. Ein grundin mundi vera, at Gøtu Jákup var so óheppin at missa annað beinið og sat tí óhøgliga úti á Oyri."

Gøtu Jákup var næstelsti sonur í Tjørnustovu í Norðragøtu, sonur Jákup og Siggu Malenu, ættað úr Lorvík. Tann elsti, Óli Jákup, gekk burtur, 37 ára gamal og ógiftur, við Nólsoyinginum í 1884 á Fuglfjarðaboðunum á veg heim av útróðri. Beiggi Ziska, Óla Jákup, kendur í Klaksvík sum "Ekspress", varð uppkallaður eftir honum.

Jákup var tískil borin til garðin, men hann segði hann frá sær av orsøkum, sum ikki er so lætt at skilja í dag. Víst segði pápabeiggi hansara Óla Jákup eisini garðin frá sær, men hetta var tí, hann hevði gift seg til ein størri garð í Skúvoy. Men at siga garð frá sær, um hann enn var lítil, fyri at velta upp úr nýggjum í nærum oyðimørk, má hava verið sjáldsamt.

Kanska er frágreiðingin tann, at tá var farið at loysa seg at rógva út, og tað slapst av við fiskin í Klaksvík. Kanska hevur tað eisini talt við, at bóndadótturin úr Gerðum, kona hansara, var roknað fyri at vera viljasterk og hevur kanska ikki viljað flutt til Gøtu.

Tískil tók næsti beiggin, Absalon, við garðinum í Gøtu. Hann er nú farin úr ættini vegna dugnaloysi hjá tí, sum nú stóð til at festa.

Sostatt var tað Millum Garðarnar, at Jákup og Marin Malena búsettust at dyrka upp úr nýggjum. Jákup var tiltikin at vera raskur, og tað er ikki smávegis av dyrkaðum lendi, sum liggur eftir hann. Jákup fekk hetta stykkið frá verfaðirinum, sum neyvan roknaði við at nakað kundi fáast burtur úr tí kortini. Hann gjørdist púra býttur, tá ið hann sá úrslitið. Tað sigst, at Jákup var eins raskur og ágrýtin at velta eftir, at hann misti annað beinið. Hetta forðaði honum heldur ikki í at gerast av raskastu útróðrarmonnum.

Børnini hjá Jákupi og Marin Malenu vóru Jákup, Christoffer, Jógvan, Óli Jákup, Markus. Sigga g. Mikkelsen, Oluffa g. Niclassen, Ziska og Hjalmar. Hetta er blivin ein ótrúliga stór ætt, sum hevur gjørt seg galdandi á nógvum økjum bæði í Klaksvík og Føroyum annars.

Ziska kom sjálvur at gerast av bestu svimjarum. Hann fekk



*Ziska var nevndarlimur í Klaksvíkar Útróðrarfelag. Standandi eru Hans Pauli Klein og Hans Jacob Frederiksen. Sitandi J.P.Kjelnæs og Ziska. Bróðursonur hansara Henry Mellemgaard manglar á myndini*